# Televarpið byrja at royndarsenda

**Komandi nýggja sjónvarpsstøðin í Føroyum, sum ber heitið Televarpið, er nú byrjað at royndarsenda, og um alt gongur eftir ætlan, fer støðin at síggja dagsins ljós seint í heyst, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri á Televarpinum**

SJÓNVARP
*Heini í Skorini*



*Tróndur Djurhuus verður stjóri á nýggju sjónvarpsstøðini, sum ber heitið Televarpið. Hann sigur, at atgongd verður til umleið 20 ymsar rásir fyri føroyskar sjónvarpshyggjarar, harímillum ein andalig rás*

Nú fer tíðin at nærkast, tá føroyingar hava møguleikan at ogna sær nýggja føroyska sjónvarpið, sum ber heitið Televarpið, og sum Føroya Tele stendur aftanfyri. Tróndur Djurhuus, stjóri á Televarpinum, sigur, at nú eru teir byrjaðir at royndarsenda umvegis Danmark Radio, og higartil hevur alt gingið væl.

– Vit hava í tvær vikur royndarsent við eini lítlari støð við eini antennu og einum sendara, og higartil hava signalini verið góð, sigur Tróndur Djurhuus.

Hann greiðir víðari frá, at teir eru varnir við at tíðarfesta, nær Televarpið verður til reiðar at senda fyri øllum føroya fólki, tí nógv er framvegis at fáa uppá pláss.

– Um tíðarætlanin heldur, og alt gongur, sum tað skal, verða vit væntandi til reiðar við Televarpinum seint í heyst, sigur Tróndur Djurhuus. Hann leggur afturat, at nógv tøknifrøðilig útgerð krevst, umframt sáttmálasamráðingar o.a., og tískil eru mong viðurskifti, sum kunnu darva og seinka um arbeiðið hjá Televarpinum.

### Fjølbroytta skrá við andaligari kanal

Viðvíkjandi skránni hjá nýggju sjónvarpsstøðini sigur Tróndur Djurhuus, at málið er at fáa eina fjølbroytta og víttfevnandi skrá av útlendskum tilfari, og at teir royna at nøkta tørvin hjá so stórum hyggjaraskara sum gjørligt.

– Samanlagt fara vit at borðreiða við umleið 20 ymsum útlendskum rásum, men samstundis royna vit at fáa hesar kanalir umvegis Danmark, so danskur tekstur verður á sendingunum, sigur Tróndur Djurhuus. Hann sigur, at eftir ætlan skal Televarpið rúma tíðindaflutningi, vísundaligum/dokumentarsendingum, og at pláss eisini verður fyri filmsrásum, barnarásum og ítróttarrásum.

– Sum eitt heldur óvanligt fyribrigdi í føroyskum sjónvarpshøpi ætla vit eisini at hava andaliga kanal á okkara skrá, og eftir øllum at døma er áhugin fyri hesum stórur í Føroyum, sigur Tróndur Djurhuus.

Higartil hevur tíðarætlanin verið hildin hjá Føroya Tele og nýggju sjónvarpsstøð teirra, men Tróndur vísir á, at ilt er at spáa um, nær rásin alment kann verða tikin í nýtslu.

# Televarpið ávirkar Sjónvarp Føroya

**Mikkjal Helmsdal, stjóri í Sjónvarpi Føroya, sigur, at við Televarpinum verður væntandi neyðugt at broyta tilfar og skrá hjá SVF. - Neyðugt er, at vit fáa møguleikan at framleiða størri nøgd av føroyskum tilfari, sigur sjónvarpsstjórin**

SJÓNVARP
*Heini í Skorini*



*Mikkjal Helmsdal, stjóri í SVF, sigur, at við Televarpinum verður møguliga neyðugt at broyta skránna hjá Sjónvarpi Føroya. – Ynski er, at vit fáa møguleika at senda meiri føroyskt tilfar, sigur sjónvarpsstjórin*

Eftir at Televarpið skjótt verður sent í stovunum kring Føroyar, ásannar stjórin í SVF, Mikkjal Helmsdal, at leiðslan noyðist at taka broytingarnar í føroyska sjónvarpsheiminum til eftirtektar. Mikkjal Helmsdal sigur, at sjálvsagt verður Sjónvarp Føroya ávirkað av nýggja sjónvarpinum, men at broytingar hóast tað ikki verða gjørdar í bræði.

– Fyrst mugu vit í SVF síggja, hvussu undirtøkan verður av Televarpinum millum føroysku hyggjararnar. Í løtuni sær helvtin av føroya fólki Danmark Radio, og um talið kemur uppá eini 80%, tvs. um Televarpið fær 30% av hyggjarum afturat, noyðast vit at justera okkara skrá, sigur Mikkjal Helmsdal.

SVF sendir nógv av sínum tilfari frá rásunum hjá Danmark Radio, DR1 og DR2, og hann vísir á, at um størsti parturin av føroya fólki longu fer at síggja hesar rásir á Televarpinum og parabolum, verður einki høpi í at senda sama tilfar á SVF. Tískil verður SVF noytt at broyta sína skrá, men stjórin í Sjónvarpi Føroya sigur, at áðrenn nakað verður gjørt, er neyðugt at bíða og vita, hvussu undirtøkan av Televarpinum og útlendsku rásunum verður.

### Vilja framleiða føroyskt

Sjónvarpsstjórin hevur fyrr víst á, at betri karmar skuldu verðið skaptir fyri framleiðslu av føroyskum tilfari, og Mikkjal Helmsdal vísir framvegis á, at ynskiliga støðan í SVF er størri nøgd og meiri senditíð av føroyskum tilfari.

– Tíðin er komin, at vit spyrja okkum sjálvi, hvat vit í veruleikanum vilja við føroyskum sjónvarpi. Er ætlanin bert at senda eina ørgrynnu av útlendskum rásum, ella skulu vit skapa karmar og grundarlag fyri føroyskum sjónvarpstilfarið, spyr Mikkjal Helmsdal. Hann vísir á, at við Televarpinum og mongu útlendsku rásunum hevði sjálvsagt verið best, um SVF framleiddi og sendi føroyskar sendingar burturav, tí annars fara føroysku sjónvarpsstøðirnar at líkjast ov nógv við sama danska tilfari.

### Politiskur spurningur

Mikkjal Helmsdal sigur, at hetta er ein politiskur spurningur, og hann saknar, at man frá politiskari síðu tekur støðu til, um man veruliga ynskir at hava eitt føroyskt sjónvarp.

– Í løtuni hava vit stutt sagt ikki fíggjarligar karmar at senda tað nøgd av føroyskum tilfari, sum vit høvdu ynskt. Mikkjal Helmsdal sigur víðari, at ynski hjá SVF hevði verið at sent føroyskt og útlendskt helvt um helvt, og at útlendska tilfarið skuldi verið umarbeitt til føroysk viðurskifti við føroyskum teksti, føroyskari talu o.s.fr. Hetta botnar í fíggjarligu viðurskiftunum hjá SVF, og í løtuni noyðist Sjónvarp Føroya at avmarka seg við føroyskum tilfari eftir peningaligu viðurskiftunum, tí føroyskar sendingar eru nevniliga nógv meiri kostnaðarmiklar enn útlendskt tilfar.

– Tilfar frá t.d. DR1 og DR2 er ókeypis, og tað er so at siga til reiðar at senda. Føroyskt tilfar krevur bæði tíð, pening og arbeiðsmegi, og tískil skuldi verið stungið út í kortið frá politiskari síðu, um Sjónvarp Føroya skal vera ein sjónvarpsstøð við føroyskum tilfari burturav, sigur Mikkjal Helmsdal at enda.

Í løtuni er nøgdin av føroyskum sendingum ov avmarkað, og við Televarpinum sum nýggjari sjónvarpsstøð, sum sambært Trónda Djurhuss fer at senda fjølbroytt útlendskt tilfar, er avgjørt neyðugt at skapa betri fíggjarligar karmar fyri einum føroyskum sjónvarpi við føroyskum tilfari.



# Ólógligi fiskiskapurin endar í rættinum

**Skiparin á trolbátinum Tindi játtaði seg sekan í at hava fiskað í einum stongdum kassa. Hann góðtekur tó ikki allar partarnar í sektaruppskotinum hjá fútanum**

FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*



*Málið um ólógliga fiskiskapin hjá trolbátinum Tindi endar í Føroya Rætti. Skiparin góðtekur ikki, at øll veiðan, sum hevur eitt virði á 168.250 krónur, skal dragast inn, men hann góðtekur hin partin í sektaruppskotinum*

MYND: Álvur Haraldsen

Sunnukvøldið varð trolbáturin Tindur av Strondum tikin við trolinum úti í stongda kassanum D2, sum er vestanfyri Suðuroynna. Økið er opið frá 31. mai til 8. juli, men stongt restina av árinum. Tað var vaktarskipið Tjaldrið, sum kom fram á bátin og tók hann við sær á Havnina.

Mánadagin seinnapartin fekk skiparin sektaruppskot frá ákæruvaldinum. Fútin krevur, at skiparin rindar eina bót á 60.000 krónur, og at hald verður lagt á fiskireiðskapin, sum er mettur til 71.000 krónur.

Harumframt krevur fútin, at hald verður lagt á alla veiðuna umborð, sum verður mett at hava eitt virði áljóðandi 168.250 krónur. Tilsamans er talan um 269.250 krónur.

### Endar í rættinum

Skiparin sigur seg góðtaka bótina á 60.000 krónur og konfiskatiónina av reiðskapinum. Hann góðtekur tó ikki, at hald verður lagt á veiðuna.

Hann vil vera við, at tað einasta, sum báturin hevði fiskað í stongda kassanum, var tann fiskurin, ið var í trolinum, tá Tjaldrið kom fram á bátin. Tí heldur skiparin, at tað er órímiligt, at øll veiðan verður tikin. Tindur hevði tosk, tungu og havtasku í lastini.

Ákærin Linda Hesselberg sigur, at ákæruvaldið heldur seg til paragraf 42 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Hon sigur, at um eitt skip verður tikið í at fiska í einum stongdum øki, so kann øll veiðan dragast inn, hóast tað ikki kann prógvast, hvar fiskurin er veiddur.

– Veiða ella virðið av veiðu kann tó verða inndrigið, hóast tað ikki er endaliga staðfest, at øll veiðan er fiskað ólógliga, stendur í paragraf 42, stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Skiparin kann tó ikki góðtaka, at øll veiðan verður drigin inn, og tí skal Føroya Rættur nú taka støðu til, hvørt veiðan skal konfiskerast ella ikki. Skiparin hevur góðtikið bótina og inndraging av reiðskapi.

Tindur fór aftur til fiskiskap mánadagin, eftir at skiparin hevði fingið sektaruppskotið. Reiðaríið hevur veitt trygd fyri teimum 269.250 krónunum, sum talan er um.

Bussleiðin boðin út:

# Trettan liggja framvið

**Trettan feløg og persónar hava biðið um útbjóðingartilfar, nú Tórshavnar kommuna á fyrsta sinni bjóðar bussleiðina í býnum út. Endamálið er at spara pening**

BUSSKOYRING
*Stefan í Skorini*



*Bussleiðin í Tórshavn verður nú boðin út til privatar at reka. Trettan feløg og persónar hava biðið um útbjóðingartilfarið*

Bussleiðin í Havn verður nú boðin privatum feløgum og fólki at reka. Útbjóðingartilfar er sent trettan persónum, og tilboðini verða latin upp 15. august. Endalig avgerð um hvør skal røkja bussleiðirnar verður tó ikki tikin fyrr enn miðskeiðis í september.

Seinastu tjúgu árini hava tað verið teir somu fýra entreprenørarnir, sum hava røkt bussleiðina í Tórshavn. Hesir fáa nú kapping frá øðrum, sum kunnu bjóða uppá bussleiðina.

Boði Haraldson á teknisku deild í býráðnum sigur, at endamálið sjálvandi er at spara pening, og at borgarin kann fáa eina betri tænastu.

– Hugt verður ikki bara eftir prísinum á tilboðnum, hóast tað mangan kann vera freistandi hjá politikarum. Vit leggja eisini dent á góðsku, aldur á bussum og tænastuna, sum viðkomandi kann veita.

Tekniska deild skal síðani lata teknisku nevnd eitt tilmæli um, hvussu hon heldur, at bussleiðin skal skipast.

### Ikki sunnudag

Upprunaliga mælti ein meiriluti í teknisku nevnd til, at eingin busskoyring verður sunnudag framyvir.

Tilboðini, sum bussfeløgini geva fyri tær ymsu leiðirnar, eru fyri seks dagar í vikuni. Sunnudagurin verður ikki tikin við í fyrsta umfari. Í tí endaliga útbjóðingartilfarinum kunnu fólk tó geva tilboð uppá sunnudag við síðuna av hinum tilboðunum.

Schumann Hjaltalin, limur í teknisku nevnd, vísir á, at alt ov fá fólk nýta bussleiðina sunnudagar, og tí var ætlanin at niðurleggja busskoyring henda dagin. Nú verður tó møguleiki at geva tilboð uppá sunnudag eisini.

Boði Haraldson sigur, at nakrar broytingar vera frá núverandi skipan. Hann sigur, at tá talan er um ferðaætlanina, fara tey at leggja seg eftir at raka skúlarnar eitt sindur fyrr á morgni.

Harumframt er ætlanin at fáa eina nýggja og meira nútíðarhóskandi skipan við ferðaseðlum, so at býráðið lættari kann fylgja við í ferðafólkahagtølunum.

Hann vísir á, at tey hava kannað tølini viðvíkjandi leið 1, 2 og 3. Á hesum leiðunum ferðast nógv fólk, og tí skuldi ligið væl fyri at fingið tað at mala runt fíggjarliga. Hinar leiðirnar, sum koyra til Kollafjørð og Kaldbak, verða ikki eins nógv nýttar.

Tilboðini verða latin upp 15. august.

*Bussleiðin hevur ongantíð áður verið boðin út til privat at reka. Nú fáa allir busseigarar høvi at geva býráðnum eitt tilboð*

